# Side Effect



*Elin Maria Olsen, praktikantur*

Side Effect er helst einasti industrial techno bólkurin í Føroyum. Side Effect byrjaði í 1999 sum ein soloverkætlan hjá Brynjolfi, nevnd 'Aura'. Seinni spældu Ludvík og Rúni við til nakrar konsertir og blivu sum fráleið størri partur av bólkinum. Tá spældu teir Breakbeat/ techno, men fóru seinni yvir til industrial techno.

Hóast Side Effect hava spælt í sjey ár, hava teir ikki veruliga verið aktuellir fyrr enn á Prix Føroyum 2005, ið var teirra gjøgnumbrot.

Teir hava útgivið eina fløgu, ið eitur 5ide 3ffect, sum kom út í mai 2006.

Vit vita jú, øll at teir eru mega lekrir og spæla góðan tónleik, men er har ikki meir?

Vit hava fingið okkum eitt prát við tveir av monnunum aftan fyri Side Effect.

*Er tað nøkur serlig grund til at tit eita Side Effect?*

– Altso vit vóru bara 15 ár, tá vit byrjaðu og hildu bara Side Effect ljóðaði feitt, uttan at hugsa um, hvat tað merkir. Tað er ikki fyrr enn seinni, at vit hava funnið týdningin, og hann er eisini rættiliga cool, akkurát sum bivirkningarnir av øllum hinum tónleikinum í Føroyum, so tað er kanska ein óbevíst grund, sigur Brynjolfur.

– Vit eru ein bivirkningur av samfelaginum vit liva í, sigur Ludvík.

*Hvat snýr tónleikurin hjá tykkum seg um?*

– Tónleikurin snýr seg um at fáa agressiónir hjá fólki fram. Fáa allar síðurnar hjá teimum fram, glað, ill, kedd, bara ógvusligt. So tað er sum heild dynamikk, sigur Brynjolfur.

– Tekstirnir eru bensin, eg helli yvir bálið. Yrkingar, tann einstaki lurtarin kann spegla sær í. Sigur Ludvík.

*Side Effect hevur verið til leingi, men tit blivu ikki ordiliga kendir fyrrenn í fjør. Hvussu er tað at vera eitt kent navn nú?*

– Nú veit eg ikki, hvussu kendir vit eru. Vit spældu nógvar konsertir fyri umleið fýra árum síðani, og har plagdu at møta nógv fólk upp, men tey skiltu ikki ordiliga tónleikin. Vit hava eisini spælt so nógv sløg av tónleiki, altíð techno, men so nógv ymisk sløg. Nú spæla vit industrial techno, og tað dámar okkum øllum væl. Vit eru í hvussu so er allir nøgdir við okkara tónleik. Vit eru eisini blivnir betri nú.

Tað er kanska eisini tað, at vit satsa upp á tann unga aldursbólkin, og hann er broyttur so nógv. Tey tíma betur techno nú. Men tað eru eisini nøkur 50 ára gomul fólk, ið lurta eftir okkum, og tað er sakin at fáa jaligan respons frá teimum.

*Um ein talentspejdari hevði »funnið« tykkum og boðið tykkum ein sáttmála í LA, høvdu tit so farið?*

– Um hann hevði bjóðað okkum eitt gott tilboð, so ja, 100%.

*Hvørjar planir hava tit fyri framtíðina?*

– Vit eru akkurát farnir í holt við at trena aftur, so vit ætla okkum at spæla onkrar gigs, í nærmastu framtíð. Eg flyti uttanlands, og har sum eg endi við at vera, fari eg at reklamera fyri bólkin, sigur Brynjolfur.

Tað er næstan altíð feitt at spæla á heimavølli, men eisini hevði tað verið sakin at sloppi út um klettarnar at rokka.

*Hvussu halda tit sjálvir, at tit passa inn í eina konsert sum til dømis ólavsøku konsertina, saman við øllum pop og punk/rock bólkunum?*

– Av tí at har eru so nógv fleiri sløg av tónleiki enn bara punk/rock og pop, haldi eg at vit passa fínt inn. Fólk hava so breiðan smag innan fyri tónleik, so vit passa væl inn. sigur Brynjolfur

– Um tað bara eru popparir, blívur tað ov einstátta. sigur Ludvík.

If you cant take the bass, get the f%#k out of my face.

*Hava tit nakra konsert í nærmastu framtíð?*

– Vit eru akkurát byrjaðir at trena aftur. Trummusláarin hjá okkum er í Danmørk, so vit hava akkurát fingið ein nýggjan fyribils, at dekka okkara reyv. Hann eitur Sveinur Gaard Olsen.

*Nú onkur tykkara gongur í skúla, verður tykkara tónleikarliga karriera nógv ávirkað av tí?*

– Nei ikki sum so. Men hevur ein onkra stóra uppgávu ella ritgerð at gera, so taka vit sjálvandi tað fram um.

*Á hvørjum støði síggja tit tykkum tónleikarliga?*

– Man er so góður sum man sjálvur heldur seg vera. Vit eru ikki so góðir innan fyri jasstónleik, men tað er heldur ikki tað vit gera. Men innan fyri industrial techno halda vit, at vit eru rættiliga góðir.

## Persónligir spurningar:

**Navn:** Ludvík Breckmann
**Aldur:** 21 Ár
**Bústaður:** Argir
**Eygnalitur:** Brún
**Hárlitur:** Brún
**Instrument:** Vokal
**Yndisbólkur/ar:** Lítla Rúm, Pantera, Sepultura, The Sex pistols
**Yndissangur/ir:** God Save the Queen
**Fyrimynd:** Nietzsche
**Yndisbar:** Irish House
**Yndisdrykkur:** Guiness
**Hvør persónur í løgtinginum er mest sakin:** Buffalo Bill
**Persónliga motto:** Kín ikki hundi, ið glettur á tonn

**Navn:** Rúni Christiansen
**Aldur:** 21
**Bústaður:** Tórshavn
**Eygnalitur:** Blá/Grá/Grøn
**Hárlitur:** Svart
**Fyrsti tankin tú hugsar tá tú vaknar:** Shiiiiiiiiiaaaaaaat.
**Instrument:** Guitar.
**Yndisbólkur/ar:** David Hasselhof og Meshuggah.
**Yndissangur/ir:** Bamse og Kylling temasangurin.
**Fyrimynd:** Pingo
**Yndisbar:** Tórshøll
**Yndisdrykkur:** Heit mjólk við hunangi í
**Dreymagentan sær út og er:** Móður Teresa
**Hvør persónur í løgtinginum er mest sakin:** Hvør var hasin sum prædikaði um C-vitaminur??
**Persónliga motto:** Ein Pannukøka kann rullast, tað kann ein vafla ikki!

**Navn:** Brynjolfur á Heygum
**Aldur:** 21
**Bústaður:** Tórshavn
Eygnalitur: Reyð
**Hárlitur:** Svart
**Instrument:** Synthseisari
**Yndisbólkur/ar:** Ov nógvir at nevna. Okkurt boð kundi verið Basshunter og Shu-bi-dua.
**Yndissangur/ir:** Alladin sangurin tulkaður av Peter Andre og Jordan
**Fyrimynd:** Andy Warhol
**Yndisbar:** Blitz! í London
**Yndisdrykkur:** Øl og Pina Colada/Sex on the beach
**Hvør persónur í løgtinginum er mest sakin:** Jenis av Rana ;p
**Persónliga motto:** ?